## Oljuprísurin setir met



Prísurin á eini tunnu av ráolju endaði í gjár á 110,87 dollarar fyri tunnuna. Tað svarar til 526 krónur. Hetta hendir, nú USA hevur minkað um goymslur sínar av ráolju, og eitt skifti í gjár var prísurin heilt uppi á 112,21 dollarar fyri tunnuna. Eisini í London var talan um methøgar prísir. Har var prísurin eitt skiti 109,50 dollarar fyri tunnuna, skrivar Ritzau.

## Ísland hækkar rentuna

Íslendski Tjóðbankin hevur í dag boðað frá, at tey hækka rentuna við hálvum prosentstigi til 15,5 prosent. Ongar grundgevingar eru nevndar í tíðindaskrivinum, men serfrøðingar krin heimin eru samdir um, at vaksandi inflatiónin og fallandi kursurin á íslendsku krónuni eru høvuðsorskirnar til hetta. Íslendska krónan er lækkað heilt nógv seinasta mánaðin, og í dag kosta 100 íslendskar krónur á leið 6,00 danskar krónur. Fyrst í mars var kostnaðurin fyri tað sama á leið 7,50 danskar krónur. Samstundis er inflatiónin økt, soleiðis at hon í mars var 8,7 prosent. Málið hjá íslendska tjóðbanaknum er at halda inflatiónini á 2,5 prosentum.

# Jóan Petur heiðraður við gávu

**Eftir at hava verið virkin í Sjálvstýrisflokkinum í samfull seksti ár, gjørdi flokkurin av at heiðra Jóan Petur Petersen á Norðskála**



*Jóan Petur Petersen legði frá sær sum kassameistari hjá Sjálvstýrisflokkinum, tá ið hann gjørdist áttati ár*



*Kári P. Højgaard, floksformaður, við lampuni, sum Sjálvstýrisflokkurin hevur givið sum heiðursgávu*

*Mynd: Sjálvstýrisflokkurin*

HEIÐURSGÁVA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á landsfundi Sjálvstýrisfloksins seinasta leygardag fekk Jóhan Petur Petersen á Norðskála eina heiðursgávu frá flokkinum.

Gávan er ein borðlampa úr føroyskum gróti, sum Árni Ziska, gróthøggari á Strondum, hevur tilevnað.

Jóhan Petur hevur verið virkin í Sjálvstýrisflokkinum í samfull seksti ár, harav hann hevur verið kassameistari í fleiri enn tríati ár.

Tá ið hann fylti áttati, legði Jóan Petur frá sær sum kassameistari.

### Trúgvur í tænastu

Hann hevur trúliga luttikið á øllum fundum og tiltøkum floksins gjøgnum hesi mongu ár. Tí gjørdi flokkurin av at heiðra undangongumannin, ið hevur tikið so nógv tøk fyri flokkin upp ígjøgnum árini.

Undan landsfundinum hesaferð, ringdi Jóan Petur Petersen og boðaði frá, at hann av heilsuávum setti seg ikki føran fyri at luttaka á landsfundinum.

# Neyðug tilgongd av arbeiðsmegi

**Í yvirlýsingini á landsfundinum sigur Sjálvstýrisflokkurin, at útlendingar, giftir føroyingum, skulu skjótari fáa arbeiðsloyvi í Føroyum. Yvirlýsingin nemur eisini við fleiri onnur mál, sum eru frammi í dagsins politikki**

LANDSFUNDUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Stutt eftir, at aðalfundur Sjálvstýrisfloksins varð settur seinasta leygarmorgun, setti flokkurin ein bólk at orða eina yvirlýsing, sum varð samtykt, áðrenn landsfundurin var lokin.

Í fyrsta lagi fegnast landsfundurin um avbera góða valúrslitið í januar og stóru tilgongdina av nýggjum virknum limum, sum flokkurin hevur havt.

- Vit ásanna, at alneyðugt er, at Føroyar samtykkja og fremja ST-sáttmálan um rættindi teirra ið bera brek. Neyðugt er at tryggja ráðgeving og eftirlit við, at sáttmálin verður hildin.

Í yvirlýsingini tekur landsfundurin undir við, at tingbólkurin roynir at fáa í lag semju við landsstýrissamgonguna um ein ábyrgdarfullan fíggjarpolitikk.

- Vit fegnast eisini um royndirnar at skapa breiðar semjur á tingi um týðandi mál, og serliga má breið semja fáast um langtíðar og burðardyggan fiskivinnupolitikk.

Landsfundurin heldur tað vera av stórum týdningi, at umhvørvisviðurskifti verða tikin í álvara.

- Átøk skulu fremjast fyri at minka um dálkandi útlát, og umhvørvisvinarligar og reinar orkukeldur, eitt nú vindur, vatn, sól-og alduorka, skulu mennast.



*Tey, sum sótu í bólkinum, ið skrivaði uppskotið til yvirlýsing Sjálvstýrisfloksins, vóru Kári á Rógvi, Kristina Toftegaard og Jan Joensen. Á myndini síggja vit Kári P. Højgaard í práti við Oddvá Nattestad, sum er ein av nýggju limunum í flokkinum og Eileen Sandá, landsnevndarlim*

*Mynd: Sjálvstýrisflokkurin*

### Útlendingaøkið

Landsfundurin heldur, at útlendingaøkið má skipast av nýggjum, so Føroyar fáa neyðuga tilgongd av arbeiðsmegi.

- Útlendingar giftir føroyingum skulu fáa arbeiðs-og uppihaldsloyvið, tá ið umsókn um familjusamanføring verður latin inn.

Heitt verður eisini á samgonguna um at raðfesta hægri lestur og at samtykkja uppskotini um rættarskipan og javnstøðu.

At enda í yvirlýsingini harmast Sjálvstýrisflokkurin um, at størri stig ikki verða tikin á sjálvstýris-og framburðsleið.